

Myndir: Ólavur Frederiksen



**Infernal broyttu gøtusand til eina stóra dansiveitslu, har fleiri túsund fólk hoppaðu og dansaðu í takt við glaða diskotónleikin.**

G!FESTIVAL
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Talan var um eina seksutta og stuttliga konsert við nógvari orku og á tremur við fangandi poppløgum, tá Infernal fór á pallin á G! góðar tveir tímar eftir, at bólkurin skuldi havt spælt. Serliga løgini 10 miles, Kalinka og From Paris To Berlin fingu sandin at lyfta seg. Her var ikki talan um nakra stórsligna tónlistarliga uppliving, men um eina veitslu - eitt satt Beach Party.

Infernal hevur nógv ár á bakið og leveraðu eina sera kekkaða og vælsmurda framførslu. Lina og Paw stýrdu framførsluni og høvdu stóran part av áskoðarafjøldini rúndarbundnan. Tann sera seksutta og framúr gjøgnumførda koreografiin var á einum støði, ið neyvan er sædd á okkara leiðum áður. Her var talan um eina væl umhugsaða framførslu, ið gav eygunum eins nógv og oyrunum. Bæði Lina, Paw og báðar dansarinnurnar framførdu koreografiina sera væl, og skaptu ein heildarshow.

Bólkurin vísti í fleiri løgum, at tey eisini dugdu annað enn bukandi diskorútmir, her var serliga hálvfúla lagið Dressed In Blue frálíkt, eitt sera funky og feitt lag, sum tó ikki á sama hátt legði upp til dansiveitslu, hetta var eisini galdandi í nøkrum øðrum løgum, og í hesum løtum misti bólkurin takið á áskoðarum, og fleiri fóru avstað, hetta var ivaleyst orsakað av, at tað var vorðið so seint, og at kuldin hesin løtuna var eitt vet meira bítandi enn restina av festivalinum.

# Ongar spælireglur

**Eg havi fingið ein nýggjan vin. Hann veit bara ikki av tí enn. Mugison var so sera fittur og líkatil, at ein kundi ikki annað enn at elska hann. Framførslan hjá Mugison bar brá av, at alt ber til. Tónleikararnir vóru lógleysingar á pallinum, og hetta var ein feit og øðrvísi konsert.**

G!FESTIVAL
Rókur Jákupsson Jakobsen
rokur@sosialurin.fo

Mugison hevði ein trummuleikara og ein bassleikara afturat sær á pallinum. Vanliga hevur hann eina teldu við sær. Hesa nýtur hann til alskyns rútmur, sum fylla væl út í tónleikinum. Men í gjár brendi teldan hjá honum saman, og tískil bleiv tónleikurin "Less pussy-stuff, more rock n´ roll".

Teir stóðu fyri eini megnar framførslu, sum prógvaði at tónleikur ikki noyðist at vera kroystur inn í nakrar spælireglur. Mugison skrivar ymiskan tónleik - okkurt var blueskent, okkurt var rokkkent, okkurt var punkkent og okkurt var singer/songwriter-kent.

Teir góvu sær góðar stundir á palli. Mugison prátaði óført, og greiddi okkum frá hvat ið fyrifórst. Millum løgini var nógvur óskipaður gangur á pallinum. Onkur klimpraði alla tíð uppá okkurt ljóðføri, og hetta tóktist eitt sindur løgi at byrja við, men skjótt skilti tú, at hetta bara var ein partur av tí róliga hýrinum hjá bólkinum.

**Daman slapp eisini uppí part**

Mugison royndi eisini at fáa áhoyrararnar við í framførsluna. Einaferð bað hann ein føroying um at koma uppá pallin, at syngja okkurt fólkakært fyri føroyingunum. Føroyingurin treiv í tvinni løg hjá Páll Finnur Páll, men hetta riggaði ikki heilt. Eina aðru ferð ringdi hann til sína damu, sum er stødd í Íslandi, og bað fólkið heilsa uppá hana. Hetta var heilt stuttligt.

Tað er júst hesin róligi hýrur, sum gjørdi konsertina so góða og øðrvísi. Tað var ein frígerandi kensla, at konsertin ikki var so tilevnað og tøtt.

Fyri mítt viðkomandi, vóru tvey løg serliga góð. Tað fyrra "Jesus is a good name to mone", var eitt feitt vælsvingandi lag, meðan tað síðsta lagið, sum snýr seg um gott vinalag, var ein serstakliga vøkur balada.

Hóast alt kendist óskipað og ófyrireikað, so spældi Mugisin & Co. eina feita konsert.

## Kaizers fekk blóðið at kóka

Jan Lamhauge var til arbeiðis á G! festivalinum sum ummælari fyri Dimmalætting. Tá vit hittu hann niðri á sandinum og spurdu, hvør høvuðsupplivingin higartil var, ivaðist Jan ikki.

- Kaizers Orchestra setti veruliga blóðið í kók. Eg kendi teir væl frammanundan og visti, at teirra tónleikur er spennandi og góður, men at hoyra teir beinleiðis var kortini ein stór uppliving, tí teir leveraðu eina dygdargóða framførslu, sigur Jan Lamhauge.

Umframt Kaizers Orchestra nevnir Jan bæði 200 og Holmes Brothers sum persónligar favorittar, men hann er skuffaður av einum øðrum høvuðsnavni á ársins G!-skrá.

- Animal Alpha skuffaði. Eg væntaði - sum ivaleyst mong onnur gjørdu við mær - eina nakað stórt frá teimum, men eg meti ikki, at bólkurin livdi upp til tað, vit væntaðu, sigur Jan Lamhauge, áðrenn hann aftur fer til arbeiðis við penni og blokki niðri á sandinum.

**HíS**



Mynd: Jens Kr. Vang

## Keisarans vinur

Kaj Johannesen, formaður í FUT, segði seg vera bergtiknan av Kaizers Orchestra, tá vit fingu orðið á hann fríggjadagin seinnapartin beint innanfyri hegnið til sjálvt G!-økið.

- Keisararnir vóru fantastiskir. Teir spældu út av pallkantinum og fangaðu áskoðarafjøldina, sigur Kaj Johannesen. Men formaðurin í FUT leggur afturat, at tað er sjálvur G!-stemningurin fram um nakran ávísan bólk, sum er høvuðsupplivingin í Syðrugøtu hetta vikuskiftið.

- Tað feitasta við G! er heilt avgjørt stemningurin, sum tú sansar allastaðni, har tú kemur. Hesin serligi stemningurin er heilt avgjørt høvuðsupplivingin við G!-festivalinum, sigur Kaj, sum júst hevur vitjað Kafe Katrin við sandin.

Eftir at hava hoyrt Kaizers Orchestra gleðir Kaj seg serliga til Beth Hart, Teit Lassen og Holmes Brothers.

- Hetta eru øll nøvn, eg havi glett meg til at hoyra, líka síðani eg sá skránna. Eftir mínum tykki hevur skráin eina høga tónlistarliga dygd, og tí vil eg fegin ynskja G! Festivalinum góðan byr, sigur Kaj at enda.

**HíS**